# VEGLEIÐING UM RÆTTIN TIL RÆTTING, STRIKING OG VIÐGERÐARAVMARKING

**Oktober 2020**

**1. útgáva**

Dátueftirlitið

# Innihald


1. Rætturin til rætting (§ 27)....2
   1.1. Hvat fevnir rætturin til rætting um?....2
   1.2. Nær hevur skrásetti rætt til at fáa sínar persónupplýsingar rættaðar? ....2
      1.2.1. Tú ert samdur við skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar....3
      1.2.2. Tá tú ikki ert samdur við skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar ...4
      1.2.3. Tá talan er um subjektivar ella fakligar metingar ....5
   1.3. Fráboðanarskylda dátuábyrgdarans (§ 30)....6
2. Rætturin til striking (”rætturin til at verða gloymdur”) (§ 28)....6
   2.1. Hvat fevnir rætturin til striking um?....6
   2.2. Fráboðanarskylda dátuábyrgdarans (§ 30)....7
   2.3. Undantøk frá rættinum til striking....8
3. Rætturin til viðgerðaravmarking (§ 29) .... 10
   3.1. Hvat fevnir rætturin til viðgerðaravmarking um?.... 10
   3.2. Hvussu kann viðgerð avmarkast? .... 11
   3.3. Fráboðan um avtøku av viðgerðaravmarking.... 11

# 1. Rætturin til rætting (§ 27)

## 1.1. Hvat fevnir rætturin til rætting um?

Rætturin til rætting merkir fyri tað fyrsta, at skrásetti hevur rætt til at fáa rangar persónupplýsingar um seg sjálvan rættaðar.

Skrásetti hevur harumframt rætt til at krevja ófullfíggjaðar persónupplýsingar fullfíggjaðar, t.d. við at leggja fram eina ískoytisváttan. Í metingini av, um persónupplýsingarnar eru ófullfíggjaðar skal m.a. fyrilit takast fyri endamálunum við viðgerðini. Sum dátuábyrgdari hevur tú ikki loyvi at nokta skrásetta at veita tær fleiri upplýsingar, um hetta úrslitar í, at málið verður meira fullfíggjað ella dagført.

Her skal viðmerkjast, at rætturin til rætting broytir ikki, at tú sum dátuábyrgdari altíð eigur at tryggja tær, at tú rættar persónupplýsingar, um tú fært frænir av, at tær eru rangar. Eisini hevur tú eina almenna skyldu at tryggja tær, at persónupplýsingarnar, sum tú viðger, eru rættar og nøktandi dagførdar, sbrt. § 7, stk. 1, nr. 4, í dátuverndarlógini.

Um tú fært eina áheitan frá skrásetta, sum ynskir at fáa rangar persónupplýsingar rættaðar, skalt tú rætta persónupplýsingarnar *uttan óneyðugt drál*. Sí meira um hetta í vegleiðing um formlig krøv í samband við rættindi hjá skrásetta, pkt. 2.4.

## 1.2. Nær hevur skrásetti rætt til at fáa sínar persónupplýsingar rættaðar?

Skrásetti hevur rætt til at fáa *rangar* persónupplýsingar um seg sjálvan rættaðar.

Tað er tó ikki altíð líka lætt hjá tær sum dátuábyrgdara at avgera, um skrásetti hevur rætt í, at persónupplýsingarnar eru rangar og tí skulu rættast.

Tríggjar støður kunnu hugsast:

1) Tað er semja millum teg og skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar
2) Tað er ósemja millum teg og skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar
3) Talan er um subjektivar ella fakligar metingar

Niðanfyri verða hesar tríggjar støður farnar ígjøgnum.

### 1.2.1. Tú ert samdur við skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar

Ert tú samdur við skrásetta um, at tú viðger rangar persónupplýsingar í málinum hjá skrásetta, skalt tú rætta upplýsingarnar. Tað kann t.d. vera um navn, aldur, bústaður, inntøka o.s.fr. eru skrásettar skeivt.

Um tú hevur eina *privata fyritøku*, skalt tú í hesum støðum rætta tær rangu upplýsingarnar.

Um tú hinvegin ert *almennur myndugleiki*, hevur tú í útgangsstøðnum skyldu til at skjalprógva tað grundarlag, sum ein avgerð í sínari tíð, er tikin á.

Tað merkir, at tú vanliga ikki bara kanst broyta ella strika upplýsingar í einum máli, tá hesar liggja á málinum. Sum almennur myndugleiki rættar ein tí vanliga tær rangu persónupplýsingarnar við at leggja tær røttu persónupplýsingarnar afturat á málið sum eitt uppískoyti, uttan at strika rangu upplýsingarnar.

Uppískoytið skal skipast á ein hátt, so at tað er gjørligt fyri komandi málsviðgerar o.o. at síggja, at upplýsingarnar eru rættaðar. Hetta kanst tú t.d. gera við, at tú í uppískoytinum vísir til rangu upplýsingarnar.

**Dømi 1 – Rangar upplýsingar í máli hjá kommunu**

Ein kommuna (K) hevur sambært sosialu lóggávuni gjørt eina kanning av viðurskiftunum hjá einum barni.

Seinni vísir tað seg, at kanningin hevur fleiri feilir, m.a. verður barnið umtalað við skeivum navni og tað stendur eisini, at barnið hevur framt herverk, hóast hetta ikki er so.

*Í hesi støðu ger K eitt nýtt skjal á málinum og skrivar týðiliga, at fyrsta kanningin hevur rangar upplýsingar.*

### 1.2.2. Tá tú ikki ert samdur við skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar

Ert tú ikki samdur við skrásetta um, at persónupplýsingarnar eru rangar, hevur tú ikki skyldu at rætta tær.

Ósemjan millum teg og skrásetta kann t.d. viðvíkja upplýsingum í eini fundarfrágreiðing ella í notum frá eini gjøgnumgongd av heiminum hjá skrásetta.

Hóast tú ikki ert samdur við skrásetta, skalt tú, sum dátuábyrgdari syrgja fyri, at tær persónupplýsingar, sum tú viðger um skrásetta eru rættar og nøktandi dagførdar.

Í slíkum førum skalt tú tí syrgja fyri, at tað verður gjørt eitt uppískoyti til tær upplýsingar, sum ósemjan snýr seg um, har tað verður greitt frá, at skrásetti er ósamdur í rættleikanum í upplýsingunum, og har tað verður greitt frá, hvat skrásetti metir er rætt. Tú hevur tó ikki skyldu til at rætta upplýsingarnar, um tað er tín sakliga meting, at tær persónupplýsingar, ið tú viðger eru rættar.

### 1.2.3. Tá talan er um subjektivar ella fakligar metingar

Summi mál, t.d. hjá almennum myndugleikum ella tryggingarfyritøkum, hava í sær uttanhýsis fakligar ella subjektivar metingar av skrásetta frá t.d. læknum ella sosialráðgevum.

Tað er ikki óvanligt, at skrásetti er ósamdur í innihaldinum, undir hesum niðurstøðunum í slíkum fakligum ella subjektivum metingum.

Í hesum støðum kann tað vera sera trupult at staðfesta um persónupplýsingarnar um skrásetta eru rangar, tí tær t.d. eru grundaðar í eini serligari læknafakligari meting. Loysnin í slíkum støðum vil tí vanliga vera, at leggja eitt notat á málið, sum greiðir frá, hvat skrásetti metir um upplýsingarnar. Tað kann t.d. henda, at skrásetti hevur eina aðra læknaváttan, har niðurstøðan er ein onnur, og slíkt eigur eisini at skjalførast á málið.

**Dømi 2 – Faklig meting hjá skúlaleiðara**

Ein skúlaleiðari (SL) skrivar til kommununa, at hann er stúrin um sín næming (N), tí hann hevur varhugan av, at misnýtsla fer fram heima hjá N.

Orsakað av fráboðanini frá SL, fer kommunan undir eina kanning av viðurskiftunum í heiminum hjá N.

Foreldrini hjá N eru ikki samd við fráboðanini hjá SL um, at misnýtsla skal fara fram í heiminum. Tey ynskja tí, at fráboðanin verður rættað.

*Í hesi støðu kunnu foreldrini hjá N uppískoyta í málið, at tey eru ósamd við, at tað er misnýtsla í heiminum, men tey kunnu ikki fáa fráboðanina frá SL rættaða ella líknandi, tí fráboðanin er ein faklig ella subjektiv meting hjá SL.*

### 1.3. Fráboðanarskylda dátuábyrgdarans (§ 30)

Umframt, at tú sjálvur skalt rætta rangar persónupplýsingar í tíni skipan, skalt tú, av tínum eintingum, eisini geva møguligum móttakarum, sum tú hevur givið tær rangu ella ófullfíggjaðu upplýsingarnar til, boð um, at hesar eru rættaðar.

Fráboðanarskyldan er ikki galdandi, um hon vísir seg at vera ógjørlig ella órímuliga torfør.

Ein slík fráboðan er vanliga ikki knýtt at stórum arbeiðsligum ella fíggjarligum byrðum hjá tær sum dátuábyrgdara. Samstundis er tað ofta av stórum týdningi fyri skrásetta, at tú lýkur fráboðanarskyldu tína. Tí kunnu bert týdningarmiklar grundir úrslita í, at tú ikki fráboðar.

Um skrásetti heitir á teg um at fáa at vita, hvørjar móttakarar, tú hevur givið persónupplýsingarnar til, skalt tú geva skrásetta hesar upplýsingar.

## 2. Rætturin til striking ("rætturin til at verða gloymdur") (§ 28)

### 2.1. Hvat fevnir rætturin til striking um?

Rætturin til striking merkir, at skrásetti – við nøkrum undantøkum – hevur rætt til at fáa upplýsingar um seg sjálvan strikaðar.

Skrásetti hevur rætt til at fáa sínar persónupplýsingar strikaðar uttan óneyðugt drál, tá *eitt* av hesum viðurskiftum gera seg galdandi:

1) Tað er ikki longur neyðugt hjá tær at hava persónupplýsingarnar um skrásetta fyri at náa tey endamál, sum tú savnaði upplýsingarnar til
2) Tú hevur grundað tína viðgerð á samtykki, sum skrásetti tekur aftur
3) Tú hevur skyldu til at strika persónupplýsingarnar, tá skrásetti mótmælir viðgerðini, og treytirnar fyri mótmæli eru loknar
4) Tú viðger upplýsingarnar uttan heimild, t.e. ólógliga
5) Tú hevur eina rættarliga skyldu at strika persónupplýsingarnar
6) Tú viðger persónupplýsingar um børn í sambandi við útboð av kunningarsamfelagstænastum, og barnið vil strikast

At tú hevur skyldu til at strika persónupplýsingarnar merkir, at upplýsingarnar skulu strikast á ein sovorðnan hátt, at tær ikki kunnu endurskapast. Tú skalt tí eisini strika upplýsingarnar frá tínum trygdaravriti (backup) o.s.fr., um hetta er gjørligt. Um tú endurskapar dátur frá tínum trygdaravriti, skalt tú undir øllum umstøðum syrgja fyri at strika persónupplýsingar, sum eru strikaðar í tíni vanligu skipan.

Tað er týdningarmikið, at tú gevur tær far um, at rætturin hjá skrásetta at biðja um striking, ikki skerjir tína skyldu, sum dátuábyrgdari, *av tínum eintingum* at strika persónupplýsingar, tá hesar ikki longur eru neyðugar til endamálið, sum tú savnaði upplýsingarnar til.

§ 7, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini ásetur, at persónupplýsingar skulu goymast soleiðis, at ikki ber til at eyðmerkja tey skrásettu í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.

Tað er tí neyðugt at áseta strikingarfreistir fyri viðgerðir av persónupplýsingum. Tú kanst t.d. áseta strikingartíðir fyri viðgerðina, sum tín myndugleiki ella fyritøka fremur í samband við arbeiðsumsóknir, viðgerð av upplýsingum um starvsfólk og viðgerð av upplýsingum í samband við málsviðgerð.

Rætturin hjá skrásetta til striking fær tí bert sjálvstøðugan týdning í teimum førum, at skrásetti heitir á teg um striking, *áðrenn eina strikingarfreist*, sum tú hevur ásett við atliti til viðgerðina.

## 2.2. Fráboðanarskylda dátuábyrgdarans (§ 30)

Umframt at strika persónupplýsingarnar í tínum egnu skipanum, skalt tú, av tínum eintingum, eisini geva møguligum móttakarum, sum tú hevur givið persónupplýsingarnar til, boð um, at hesar eru strikaðar.

Fráboðanarskyldan er ikki galdandi, um hon vísir seg at vera ógjørlig ella órímuliga torfør.

Um tú hevur almannakunngjørt persónupplýsingarnar, sum skulu strikast, herðist tín fráboðanarskylda, sbrt. § 28, stk. 2 í dátuverndarlógini. Í hesum førum skalt tú seta rímilig

tiltøk í verk – við fyriliti til tí tøkni, sum er atkomulig og til útreiðslurnar – fyri at fráboða dátuábyrgdarum, sum framvegis viðgera persónupplýsingarnar. Tú skalt kunna hesar dátuábyrgdarar um, at skrásetti hevur biðið um, at persónupplýsingarnar verða strikaðar.

Tað skal viðmerkjast, at tú sum dátuábyrgdari, bert hevur skyldu til at boða øðrum dátuábyrgdarum frá, t.e. ikki dátuviðgerum.

Um tú sum dátuábyrgdari fært eina fráboðan um striking, skalt tú meta um – eins og tann dátuábyrgdari, ið hevur kunnað teg – hvørt skyldan til at strika upplýsingarnar eisini er galdandi fyri teg, ella um tú framvegis kanst viðgera tær lógliga.

## 2.3. Undantøk frá rættinum til striking

Rætturin til striking er ikki treytaleysur. Í § 28, stk. 3 í dátuverndarlógini er eitt yvirlit yvir undantøk frá rættinum til striking.

Rætturin til striking er *fyri tað fyrsta* ikki galdandi um viðgerð av persónupplýsingunum er neyðug fyri at útinna rættin til framsøgufrælsi og kunningarfrælsi. Ásetingin hevur við sær, at rætturin til dátuvernd víkir fyri hesum grundleggjandi rættindum, sum m.a. eru tryggjað í Evropeiska mannarættindasáttmálanum

Rætturin til striking er *fyri tað næsta* ikki galdandi, um viðgerðin er neyðug fyri at halda eina rættarligu skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum, um hon er neyðug fyri at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er álagt.

Ásetingin svarar til viðgerðarheimildirnar í § 8, stk. 1, nr. 3 og 5, og hevur við sær, at um hesar heimildir eru grundarlagið undir viðgerðini, er rætturin til striking í útgangsstøðinum ikki galdandi. Ásetingin hevur við sær, at rætturin til striking aloftast ikki kann gerast galdandi mótvegis almennum myndugleikum, sum viðgera persónupplýsingar, sum liður í teirra uppgávum. Í tí almenna verður vanliga ikki rættað í skjølum, sum longu eru gjørd. Eru upplýsingar rangar o.s.fr. kann hetta verða skjalfest heldur enn strikað.

Rætturin til striking er *fyri tað triðja* ikki galdandi um viðgerðin er neyðug til savnsendamál, søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, og tað er sannlíkt at striking fer at gera tað ómøguligt ella í sera stóran mun fer at forða fyri, at endamálini við viðgerðini verða rokkin.

Rætturin til striking er *fyri tað fjórða* ikki galdandi um viðgerðin er neyðug fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast. Hetta hevur t.d. við sær, at tú kanst halda fram at viðgera upplýsingarnar, um tær skulu brúkast í einum rættarmáli, t.d. móti skrásetta.

**Dømi 3 – Fyritøka almannakunnger sjónfílu-heilsan á heimasíðu**

Ein fyritøka (F) hevur kunngjørt sjónfílu-heilsanir á síni heimasíðu, har einkulta starvsfólkið sigur, hvør viðkomandi er, og hvat viðkomandi starvast við. Starvsfólkini hava frammanundan givið samtykki.

Eitt starvsfólk (S) hevur av persónligum ávum angrað, at hon hevur givið samtykki til kunngering av sjónfílu-heilsanini. Hon biður tí F um at strika sjónfíluna.

*Í hesum førinum skal F strika sjónfíluna frá heimasíðuni, tí S hevur tikið aftur tað samtykki, sum kunngeringin er grundað á.*

*Harumframt skal F eisini seta rímilig tiltøk í verk fyri at boða øðrum dátuábyrgdarum, ið framvegis viðgera upplýsingarnar.*

*Við brúk av tøkniligum miðlum kann F staðfesta, at ein onnur fyritøka (B) hevur tikið niður (downloadað) sjónfíluna, og tí boðar F B frá áheitanini frá S um striking.*

B hevur tikið sjónfíluna niður, tí fyritøkan umhugsar at nýta S sum nýggjan ráðgeva. B ætlar tískil at vísa sjónfíluna fyri stjóranum til ein fund um ein mánað.

*Fyritøkan B skal nú, aftaná at hava fingið fráboðanina frá F, meta um B framvegis kann viðgera sjónfíluna lógliga ella um sjónfilan skal strikast.*

Felags fyri undantøkini er, at viðgerðin í øllum førum skal vera *neyðug*. Tað er sostatt ikki nokk, at viðgerðin léttir um hjá tær.

## 3. Rætturin til viðgerðaravmarking (§ 29)

### 3.1. Hvat fevnir rætturin til viðgerðaravmarking um?

Rætturin til viðgerðaravmarking merkir, at tann skrásetti í summum førum hevur rætt til at krevja, at viðgerð av persónupplýsingum verður avmarkað, so at tú sum dátuábyrgdari bert kanst goyma persónupplýsingarnar og ikki viðgera tær á annan hátt. Í slíkum førum skulu persónupplýsingar merkjast við tí endamáli at avmarka framtíðar viðgerð av upplýsingunum. Skrásetti kann krevja, at tú sum dátuábyrgdari avmarkar viðgerð av persónupplýsingum í hesum førum:

a) *ímeðan tú kannar, um persónupplýsingarnar eru rættar, tá skrásetti hevur mótmælt rættleikanum.*

Tú skalt avmarka viðgerðina, um tann skrásetti ger vart við, at persónupplýsingarnar eru rangar. Tú kanst – í staðin fyri at strika persónupplýsingarnar alt fyri eitt – avmarka viðgerðina til tað er staðfest, um persónupplýsingarnar eru rættar ella rangar. Eru persónupplýsingarnar avmarkaðar, kanst tú í útgangsstøðinum ikki viðgera persónupplýsingarnar á annan hátt enn at goyma tær.

b) *viðgerðin er ólóglig, og skrásetti setir seg upp ímóti, at persónupplýsingarnar verða strikaðar og í staðin biður um, at nýtslan av teimum verður avmarkað.*

Skrásetti kann krevja, at tú í staðin fyri at strika persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar ólógliga, avmarkar viðgerðina. Henda ásetingin kann m.a. verða nýtt, um tann skrásetti ynskir at nýta upplýsingarnar sum prógv í sambandi við endurgjald.

c) *tú hevur ikki longur tørv á persónupplýsingunum til viðgerð, men tær eru neyðugar fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast.*

Viðgerðin skal avmarkast, um tú ikki longur hevur brúk fyri upplýsingunum til ta viðgerð, sum upplýsingarnar upprunaliga vórðu viðgjørdar til, men brúk er fyri upplýsingunum, fyri at eitt rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast.

d) *ímeðan tú kannar, hvørt treytirnar í § 32 eru loknar, tá skrásetti hevur mótmælt viðgerðini.*

Tú skalt eisini avmarka viðgerð, meðan kannað verður um treytirnar í § 32 um mótmæli eru loknar. Eru treytirnar loknar, kanst tú ikki longur viðgera upplýsingarnar, sum so skulu strikast.

## 3.2. Hvussu kann viðgerð avmarkast?

Viðgerðaravmarking av persónupplýsingum kann t.d. henda við, at upplýsingarnar gerast óatkomandi fyri brúkararnar av tíni skipan (t.d. við loyniorðum). Í hesum sambandi eigur tað greitt at upplýsast í skipanini, at upplýsingarnar eru avmarkaðar, so at brúkarin verður kunnaður.

Viðgerðaravmarking kann eisini gerast við, at upplýsingarnir fyribils verða fluttar í eina aðra skipan, ella at upplýsingarnar fyribils verða strikaðar av tíni heimasíðu, um upplýsingarnar eru almannakunngjørdar.

## 3.3. Fráboðan um avtøku av viðgerðaravmarking

Tú skalt kunna tann skrásetta, áðrenn ein viðgerðaravmarking verður tikin av. Ein viðgerðaravmarking kann takast av, tá treytirnar fyri viðgerðaravmarkingini ikki longur eru til staðar. Hetta kann t.d. vera, tá tú hevur staðfest, at treytirnar fyri mótmæli í § 32 ikki eru uppfyltar.

Tá tú avmarkar eina viðgerð av persónupplýsingum, skalt tú eisini – umframt at avmarka persónupplýsingarnar í tínum skipanum – geva møguligum móttakarum, sum tú hevur givið persónupplýsingarnar til, boð um, at hesar eru avmarkaðar.

Fráboðanarskyldan er ikki galdandi, um hon vísir seg at vera ógjørlig ella órímuliga torfør.

**Dømi 4 – Rættarmál í samband við vantandi gjald frá kunda**

Ein hondverkarafyritøka (A) fær til uppgávu at gera eina terrassu fyri ein kunda (K). Í samband við arbeiðið, skrásetur A upplýsingar hjá K um navn, bústað, upplýsingar um veitingina og um K hevur goldið. Umframt hetta, leggur A kundan afturat yvirlitinum á síni heimasíðu yvir tær verkætlanir, sum felagið er í gongd við.

Aftaná at hava keypt tilfar til arbeiðsuppgávuna fær A trupulleikar við at fáa K at gjalda. Hóast A rykkir K fleiri ferðir, má A til síðst siga avtaluna við K upp, tí K vil ikki rinda.

Í samband við uppsøgn av avtaluni, heitir K á A um at strika skrásettu upplýsingarnar um K.

*A kann her nokta at strika upplýsingarnar, tí upplýsingarnar eru neyðugar fyri, at eitt rættarkrav (endurgjaldskrav) kann sannast og gerast galdandi mótvegis K.*

Aftaná, at A hevur avvíst at strika upplýsingarnar hjá K, heitir K ístaðin á A um at avmarka viðgerðina.

*Orsakað av, at A ikki longur hevur brúk fyri upplýsingunum um K til at loysa upprunaligu arbeiðsuppgávuna (terrassan), men upplýsingarnar sum nevnt, eru neyðugar við atliti til at sanna og gera eitt krav galdandi, skal A avmarka viðgerðina av upplýsingunum um K, so at hesar bert verða nýttar til at gera kravið mótvegis K galdandi. A skal tí strika K frá yvirlitinum á heimasíðu síni yvir verkætlanir, sum eru í gongd.*

**Vegleiðing**
© 2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið